# Trol á Leirvíkarvegnum

*Tá hølini verða ov trong til stóru nýmótans trolini, er bara at fara út á vegin at gera tað, sum gerast skal*



*Tá tað gerst ov trongt inni, verður neyðugt at fara út á vegin at bøta trol*
**Mynd: Edvard Joensen**

Menn frá trolvirkinum Vónini vóru hendan dagin, myndamaðurin kom framvið, í ferð við at bøta trol mitt á gamla Leirvíkarvegnum.

Svartkjaftatrolini eru í dag so stór, at illa gongst at húsa teimum innandura á trolvirkinum Vónini í Fuglafirði.

Men sjálvdan eru menn tó ráðaleysir. So tá nú gamli Leiríkarvegurin liggur at kalla ónýttur kortini, varð roynt, um ikki til bar at sleppa at brúka hann at strekkja hesi longu trolini eftir, meðan bøtt varð. Tað var einki í vegin fyri tí, og so varð gjørt.

Hetta er ein góð skipan, siga trolmenninir. Og vanliga órógva teir onga ferðslu heldur, tí hon fer gjøgnum tunnilin. Tó er tað kortini so, at onkur koyrir eftir gamla vegnum enn. Einamest um summarið, siga teir. Men teir hava skelti og avmerkingar, so tann síðan er í lagi.

Tað plagar at ganga rímiliga skjótt at bøta trolini, tá teir strekkja tey eftir vegnum. Men tað er tó komið fyri, siga teir, at teir hava havt tey liggjandi á vegnum einar tveir dagar.

Hendan dagin, Sosialurin kom framvið, var tað trolið hjá stóra danska svartkjaftaskipinum Gitte Henning, sum teir júst vóru í ferð vi at fáa aftur í bilin.

ej

## Veðrið

### Fimmdagaforsøgnin frá DMI



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Seinnapartin hvassur vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og útnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fyrrapartin lot av ymusm ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og eitt skifti regn. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Hvassur vindur av útsynningi og regn, men sunnudagin minni vindur og sólglottar, tó okkurt ælið. Hitin millum 9 og 13 stig.




Lágtrýstið í útsynning úr Írlandi fer fyrst móti Bretsku Oyggjunum, seinni móti Íslandi.




Lágtrýstið vestanfyri Føroyar fer norðureftir, men ein hátrýstryggur í landsynning úr Hvarvinum verður væntandi yvir Føroyum fríggjamorgunin.




**Hitalagið mált frá 2./10. kl 06[00]–3./10. kl 06[00]. Hitin í gjár: 9,4°C**
Minsti hiti máldur í oktober: **÷4,0°** Mesti hiti máldur í oktober: **18,4°**




Avfallið: 6,0 mm – **mált frá 2./10. kl 6[00]–3./10. kl 06[00]**
Avfallið higartil í oktober: 6,9 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷3 |
| Nuuk | ÷1 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 14 |
| Tromsø | 10 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannahavn | 14 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 17 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 20 |
| Róm | 21 |
| Malorca | 21 |
| Athen | 27 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 15 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 18 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 12 |

## Vestfalskyrrindi

5. okt.: Fyrra kvarter
6. okt.: Mánin longst frá jørðini

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/ Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/ Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. okt. | 11.23 | 23.48 | 10.23 | 22.48 | 10.38 | 23.03 | 01.00 | 13.23 | 02.00 | 14.23 | 09.38 | 22.03 | 08.38 | 21.03 | 11.38 | – | 00.15 | 12.38 | 11.08 | 23.33 | 00.00 | 12.23 |
| 5. okt. | – | 12.16 | 11.16 | 23.47 | 11.31 | – | 01.48 | 14.16 | 02.48 | 15.16 | 10.31 | 23.02 | 09.31 | 22.02 | 00.03 | 12.31 | 01.03 | 13.31 | – | 12.01 | 00.48 | 13.16 |
| 6. okt. | 00.47 | 13.19 | – | 12.19 | 00.02 | 12.34 | 02.47 | 15.19 | 03.47 | 16.19 | 11.34 | – | 10.34 | 23.10 | 01.02 | 13.34 | 02.02 | 14.34 | 00.32 | 13.04 | 01.47 | 14.19 |
| 7. okt. | 01.55 | 14.32 | 00.55 | 13.32 | 01.10 | 13.47 | 03.55 | 16.32 | 04.55 | 17.32 | 00.10 | 12.47 | 11.47 | – | 02.10 | 14.47 | 03.10 | 15.47 | 01.40 | 14.17 | 02.55 | 15.32 |

Kelda: Skipalistin 2000

sosialurin www.sosialurin.fo